# Sóttarhalds-tíðarskeiðið verður stytt úr 10 døgum niður í 7 dagar

### Tey, sum eru avbyrgd

Hevur tú fingið staðfest korona, skalt tú í sóttarhald í 7 dagar frá sjúkutekini byrja og/ella positivum kanningarúrsliti. Seinastu 48 tímarnir skulu vera uttan sjúkutekin. Tað vil siga, hevur tú ikki havt sjúkutekin 6. og 7. dag av avbyrgingini, sleppur tú úr sóttarhaldinum 8. dagin.

### Tey, sum eru í sóttarhaldi

Ert tú ikki fult koppsettur og hevur tú havt beinleiðis samband við ein, sum hevur fingið staðfest korona, verður mælt til, at tú fert í sóttarhald í 7 dagar frá seinastu kontakt við tann positiva. Mælt verður til, at tú kannar teg 4. og 6. dag. Hevur tú eitt negativt kanningarúrslit frá 6. degi, sleppur tú úr sóttarhaldinum 8. dagin.

Ert tú fult koppsettur og hevur tú havt beinleiðis samband við ein, sum hevur fingið staðfest korona, verður mælt til, at tú ert varin og kannar teg 4. og 6. dag frá seinastu kontakt við tann positiva.

### Serlig fyrivarni í sambandi við Omikron-fyribrigdi

| **1. lið**<br>Smittaði persónurin | **2. lið**<br>Beinleiðis samband við 1. lið | **3. lið**<br>Beinleiðis samband við 2. lið |
|---|---|---|
| I<br>**Avbyrging**<br>I<br>Avbyrging í 10 dagar, umframt 48 tímar uttan sjúkueyðkenni | I<br>**Sóttarhald**<br>I<br>**Ókoppsett** – Í sóttarhald í 10 dagar<br>I<br>**Koppsett** – í sóttarhald í 10 dagar, ella til staðfest er at talan ikki er um Omikron fyribrigdið hjá 1. liði | I<br>**Sóttarhald**<br>I<br>Í sóttarhald í 10 dagar, ella til negativt kanningarúrslit hjá sambandi í 2. liði |